

# Seyðhundar sleppa at royna seg

Absalon Hansen, sum ígjøgnum árini hevur gjørt vart við seg innan nógvar ítróttargreinar, er helst fremsti seyðhundavenjari í landinum. Umframt hundurin Fleet, sum her er avmyndaður sunnanfyri Hósvík fyrrapartin, har Absalon seinastu góð seks árini hevur ríkið eitt festi, hevur hann tríggjar aðrar vaksnar seyðhundar og tveir hvølpar

**Fyri triðju ferð verður skipað fyri seyðhundakapping á Viðareiði. Seinast luttóku yvir 40 hundar, og hesaferð vænta luttakararnir, at millum 30 og 40 seyðhundar vera við í kappingini. Teir bestu hundarnir hava møguleika at vinna sær pláss til HM í Wales í september. Kendi fyrrverandi rennarin, Absalon Hansen, ið nú er bóndi, luttekur við fýra hundum**

KAPPING

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Absalon Hansen*

Um veðrið verður til vildar nú leygardarin, verður skipað fyri stórari seyðhundakapping á Viðareiði. Hetta er á triðja sinni, at seyðhundakapping er á Viðareiði, og fyrireikararnir siga, at kappingin er komin fyri at verða.

Seinast luttóku yvir 40 hundar, og tí verður kappingin hesaferð løgd soleiðis til rættis, at kappast verður í tveimum støðum samstundis.

Kappingin er býtt upp í tríggjar bólkar. Klassi 3, ið umfatar teir elstu og bestu hundarnir í landinum, koma at kappast eysturi á Heiðum. Hesir hundarnir fáa tveir møguleikar. Tann, sum samanlagt fær mest stig, hevur vunnið kappingina. Henda kappingin er ein kvalifikatiónskapping til Continental í august og til VM í Wales í september í ár.

Klassi 1 og 2 koma at kappast á einum øðrum øki, og miðað verður ímóti, at kappingarnar verða lidnar nøkunlunda um somu tíð. Klassi 1 umfatar teir yngstu hundarnar.

## Kendur dómari luttekur

Aftaná verða steyp og heiðursmerki handaði til nummar 1, 2 og 3 í hvørjum bólki.

Tað, sum sermerkir kappingina hesaferð, er, at ein útlendskur dómari kemur at døma kappingina í klassa 3. Talan er um Julie Hill í Skotlandi, ið hevur nógvar royndir innan hetta økið. Hon er født og uppvaksin í Onglandi, men býr í Skotlandi, har hon hevur ein bóndagarð sunnanfyri Edinburg.

Julie Hill er ein av best kendu fólkunum innan seyðahundar og hevur millum annað vunnið »The International Supream Champion« í 1996 við hundinum Moss, og í 2006 var hon nummar tvey við hundinum Tess. Hetta er tann hundurin, ið hon hevur nú. Talan er um størstu hundakapping í Stórabretlandi. Eisini er hon útnevnd at vera besta kvinnuliga sokallaða »hander« av BBC seinastu 30 árini. Eisini er hon kend fyri at halda skeið og døma kappingar í USA og í Europa. Í 2003 gav hon út bókina »The natural way« út, sum snýr seg um venjing av seyðahundum.

Sunnudagin kemur Julie Hill at halda skeið á Viðareiði fyri seyðahundum og eigurum teirra.

Tað eru teir fimm seyðahundaeigararnir, Jákup Jacobsen. Tróndur Petersen, Niels Absalonsen, Esmar Sørensen og Eyðstein Jensen, ið saman við Føroya Seyðhundafelagnum, ið skipa fyri kappingini og skeiðnum á Viðareiði.



*Seyður er sera harðførur, sigur Absalon Hansen, sum kallar eyglittu ærina fyri »Undurið«, tí hon einaferð hevði meislað beinið so illani, at hann ætlaði at avlíva hana. Hann gjørdi tó av at geva henni ein møguleika, og ærin kom væl og virðiliga fyri seg aftur*

**Laborantur/tøkningur til Kemilux**

Vit bjóða tær eitt spennandi og avbjóðandi starv í eini fyritøku í rúkandi menning, her heima so væl sum í útlondum. Arbeiðsuppgávurnar hjá tær fara m.a. at fevna um:

- luttøku í menningini av nýggjum og verandi vørum
- at taka sýni úr framleiðsluni
- innkeyp av ráværu
- gerð av vaskiætlanum/vaskiskeið til virkir og stovnar
- samskifti við veitarar og viðskiftafólk

Vit vænta, at tú ert ídnaðarlaborantur/tøkningur, ella hevur aðra samsvarandi útbúgving. Tú ert eisini før/ur fyri at hugsa og arbeiða sjálvstøðugt og ert uppsøkjandi av lyndi. Tú dugir at gera framløgur og at arbeiða við Excel. Vit vænta eisini, at tú dugir at samskifta á enskum og skandinaviskum. Tú fert at virka í tøttum samstarvi við leiðslu og góðskuleiðara. Arbeiðstíðin er í løtuni 30 tímar um vikuna. Løn og setanarviðurskifti annars verða eftir avtalu.

Umsóknin, sum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 25/2, skal sendast til:

P/F Kemilux
Postboks 1231
Mykinesgøta 1
FO-110 Tórshavn

- ella til: johannaz@kemilux.com

Vilt tú vita meira um starvið, so ring á 350830 og spyr eftir Jóhonnu.

*Føroyska fyritøkan KEMILUX bjóðar eina fullfíggjaða skrá av reingerðarevnum til fiski- og matvøruídnaðin umframt vanliga húsarhaldið. Eisini hava vit stórt úrval av amboðum og tólum í sambandi við øll øki innan reingerð í vinnuni so væl sum í húsarhaldinum. Umleið triðingurin av framleiðslu okkara verður seld uttan fyri Føroyar.*

*KEMILUX framleiðir eftir altjóða ISO:9001 góðskuskipanini. KEMILUX er skrásett hjá Achilles sum góðkendur veitari til m.a. oljuvinnuna. Allar vørur okkara, til heimamarknaðin so væl sum til útflutning, verða framleiddar samsvarandi lógum og reglugerðum hjá EF og teimum londum, sum útflutt verður til.*

*KEMILUX hevur sum aðalmál at vera fremsti veitarin av dygdarbestu reinsi- og vaskievnum, tilhoyri og amboðum til vinnu og ídnað so væl sum til húsarhald og stovnar.*

MJ MEDIA tlf 219776

**KEMILUX**